# Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 22. mars 2021
Mál nr.: 21/00032
Málsviðgjørt: HZH/TH
Eftirkannað: 27. mars 2021

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**tillagingar av prógtøkum á gymnasialum miðnámi, orsakað av COVID-19**

**§ 1.** Landsstýrismaðurin kann, orsakað av COVID-19 støðuni, í kunngerð víkja frá reglum í § 1, stk. 8 og § 18, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar.
*Stk. 2.* Verður lóggáva sett til síðis sambært stk. 1, skal fyrilit havast fyri, at næmingar og lesandi ikki verða sett í verri støðu enn frammanundan, og at møguleikarnir fyri víðari lestri ikki verða skerdir.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. oktober 2021.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Skúlagongdin hetta skúlaárið hevur verið merkt av koronu. Í tveimum umførum hevur smitta verið staðfest á Glasi, og øll undirvísing skipað umvegis netið í umleið eina viku. Hóast aðrir skúlar ikki hava latið aftur í sama mun, hevur sóttarhald viðført økta fráveru og fjarundirvísing bæði hjá næmingum og lærarum, og í einstøkum flokkum hevur verið nakað av fjarundirvísing fyri einstakar næmingar, næmingar í sóttarhaldi, næmingar í vandabólki og næmingar við tøttum sambandi við fólk í vandabólki.

Í Danmark hevur skúlagongdin verið nógv merkt av koronu, og avgjørt er, at talið av prógvtøkum hetta skúlaárið eisini verður tillagað. Næmingarnir fara til færri prógvtøkur, og í staðin verða ársmet flutt til prógvtøl. Av tí at flestu føroyingar, sum lesa víðari uttanlands, fara undir hægri lestur á útbúgvingarstovnum í Danmark, og Føroyar hava eina avtalu við danskar myndugleikar, sum javnstilla føroysk prógv við tey donsku, verður mett, at tillagingar eisini eiga at gerast í okkara prógvtøkum.

Tørvur er tí á at hava heimild til at víkja frá galdandi lóggávu í tann mun, tað er neyðugt, fyri at teir næmingar á miðnámi, sum skulu til prógvtøku í summar, ikki verða verri stillaðir enn danskir næmingar, sum fáa prógv í ár.

Tær serreglur, ið landsstýrismaðurin setur í gildi við heimild í hesi løgtingslóg, fella burtur, tá ið lógin fer úr gildi 1. oktober 2021.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva á økinum er løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 18. desember 2015.

Tá koronakreppan tók seg upp á vári 2020, samtykti Løgtingið løgtingslóg nr. 48 frá 7. apríl 2020 um serligar reglur um prógvtøkur orsakað av COVID-19, ið heimilaði landsstýrismanninum at víkja frá galdandi lóggávu á útbúgvingarøkinum. Henda løgtingslóg fór úr gildi 1. oktober 2020.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógini er at mótvirka avleiðingum, ið átøkini at basa COVID-19 smittuni hava fyri næmingar, sum skulu til prógvtøku, og virka fyri, at hesir næmingar ikki verða settir í verri støðu enn undir vanligum umstøðum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið gevur heimildir til at gera broytingar innan prógvtøkur í gymnasialum miðnámi til tess at mótvirka avleiðingar, sum tiltøk í sambandi við COVID-19 hava havt og kunnu hava fyri næmingarnar í sambandi við prógvtøkur og víðari lesnað.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Um prógvtøkureglur og viðurskifti verða broytt, er tað umráðandi, at teir næmingar og tey lesandi, ið verða umfatað av broytingunum, verða kunnað skjótast gjørligt. Tað er eisini umráðandi, at viðkomandi myndugleikar og útbúgvingarstovnar fáa nóg mikið av tíð at

fyrireika møguligar broytingar. Tað hevur tí skund at fáa uppskotið samtykt, og tí er lógaruppskotið ikki sent til hoyringar. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tó ráðført seg við Undirvísingarstýrið, Nám og gymnasialu útbúgvingarstovnarnar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið, og ongar fyri kommunur. Um prógtøkur verða avlýstar, kann talan í summum førum verða um eina sparing og í øðrum førum um ein meirkostnað, um prógtøkur skulu skipast øðrvísi.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Prógstovan hevði longu lagt prógtøkurnar fyri 2021, og tillagingarnar, ið verða gjørdar við heimild í hesum uppskoti fara tí at hava nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Prógstovuna.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið fer helst at hava avleiðingar fyri næmingar, av tí at prógtøkur møguliga verða broyttar ella strikaðar. Ásett er tó í uppskotinum, at slíkar broytingar ikki eiga at hava við sær, at næmingurin verður settur í eina verri støðu enn undir vanliga galdandi reglum. Her verður serliga hugsað um møguleikar at lesa víðari eftir loknan lestur.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ikki viðkomandi fyri uppskotið.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Ikki viðkomandi fyri uppskotið.

### 2.9. Markaforðingar
Ikki viðkomandi fyri uppskotið

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur hvørki við sær revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimild ella onnur týðandi inntriv í rættindi borgarans.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hvørki áleggur ella broytir skattir ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki næmingum ella øðrum nýggjar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í *§ 1* verður heimilað landsstýrismanninum við kunngerð at víkja frá reglum í aðrari løgtingslóg. Talan er um ásetingar, ið viðvíkja prógvtøkuviðurskiftum á teimum ymsu breytunum. Heimildin umfatar bert broytingar í prógvtøkuviðurskiftum og ikki í øðrum viðurskiftum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Føroyar hava eina avtalu við danskar myndugleikar, sum javnstilla føroysk prógv við tey donsku. Gjøgnum hesa avtalu verða føroysk prógv eisini javnstillað við prógv í øðrum Norðurlondum. Henda avtalan hevur við sær, at føroysk prógv eisini verða javnstillað við donsk prógv, um landsstýrismaðurin víkir frá reglunum um prógvtøku.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í *stk. 1* fær landsstýrismaðurin heimild til at seta til síðis partar av galdandi lóggávu á gymnasiala útbúgvingarøkinum. Hetta verður gjørt í kunngerð, og er treytað av, at tað verður mett neyðugt orsakað av teimum avleiðingum, sum koronustøðan hevur havt fyri næmingarnar.

Kunngerðirnar kunnu bert umfata viðurskifti, ið viðvíkja prótøkum og prótøkuhaldi. Í *§ 1, stk. 1* eru nevndar tær ásetingar í løgtingslóg nr. 62 frá 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, ið eru umfataðar av heimildini hjá landsstýrismanninum. Talan er ikki um løgtingslógina í síni heild, men bert um tær ásetingar, ið eru nevndar í uppskotinum.

Í § 1, stk. 8 í løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar er ásett:

> *"Stk. 8. Útbúgvingarnar eru ein heild og enda tær við prótøku við støði í greitt fyrisettum fakligum málum."*

Í § 18, stk. 1 og 2 í somu løgtingslóg er ásett:

> ***"§ 18.** Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar enda við prótøku. 3 ára gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar fevna um í minsta lagi 9 prótøkur, íroknað prótøku í eini breytaverkætlan. Í ítrótti og heilsu verður tó eingin prótøka hildin.*
> *Stk. 2. Gymnasiala fyrireikingarbreytin endar við prótøku í øllum lærugreinum, tó ikki í lærugreinini ítróttur og heilsa."*

Ætlanin er at lækka talið av prótøkum og flyta ársmet til prómet.

Í *stk. 2* verður ásett, at ásetingar, sum verða gjørdar sbrt. hesi løgtingslóg, skulu gerast á ein hátt, sum tekur fyrilit fyri, at ein broyting ikki avmarkar møguleikarnar fyri víðari lestri. Hetta verður tryggjað við, at allar broytingar verða gjørdar í samráði við danskar myndugleikar, so at avtalan, ið er nevnd í 2.16 framvegis er galdandi.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu, og nær løgtingslógin fer úr gildi aftur. Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýrismanninum heimild til at tillaga prótøkurnar á sumri 2021. Løgtingslógin hevur onki endamál eftir hetta, og tí fer hon sjálvvirkandi úr gildi á heysti 2021.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 13. apríl 2021

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen